Løgmaður vil spara:

# Uppsagnir kunnu gerast neyðugar

**– Við skerjingini av aðalráðum verða nakrar dupultfunktiónir í fyrisitingini, og er tað nú uppgávan hjá teimum sjey aðalráðunum at rationalisera og spara. Tískil kunnu uppsagnir eisini gerast neyðugar, um vit skulu hála inn á hallið á 400 milliónir krónur á komandi fíggjarlóg, sigur Jóannes Eidesgaard løgmaður. Við broytingunum í fyrisitingini sigur hann seg nú hava slóðað fyri komandi sparingum og møguligum uppsagnum**



*– Tað verður fokuserað so nógv uppá, at sparingar ikki eru framdar í teimum fyrisitingarligu broytingum, sum júst eru framdar, men tað er tað, vit við skerjingini av aðalráðum hava ruddað slóð fyri, og nú er so klárt at taka næsta stigið, um fíggjarlógin skal vera nøkunlunda borðbarð á tingi, sigur Jóannes Eidesgaard løgmaður, sum ikki útilokar uppsagnum í aðalráðunum*

SPARINGAR
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Føroyska fíggjarlógin stendur í løtuni at fáa eitt hall á góðar 400 milliónir krónur, og sambært løgmanni er tískil alneyðugt hjá ráðunum at rationalisera og effektivisera fyrisitingina. Í teimum broytingum, sum í hesum valskeiði eru framdar, eru aðalráðini farin frá níggju niður í sjey, men tó hava ongar uppsagnir verið, og ein kann tískil spyrja, hvar sparingarnar eru, um embætisverkið er eins stórt og áður.

– Í fyrstu syftu spara vit bert tvær landsstýrismannalønir, sum er ein góð millión um árið, men við niðurskurðinum av aðalráðum verða sjálvsagt nakrar dupultfunktiónir, og tískil er uppgávan nú at finna tey øki, har vit kunnu spara, sigur løgmaður. Jóannes Eidesgaard vísir á, at tað í fyrstu syftu ikki hevur verið gjørligt at skerja samlaða embætisverkið og niðurleggja uppgávur, men eftir at aðalráðini nú eru tvey færri, eru møguleikarnir betri at spara.

– Hetta er so uppgávan hjá núverandi sjey ráðum, og í ljósinum av samlaðu búskaparligu støðuni kunnu uppsagnir gerast neyðugar, hóast tað ongantíð er eitt mál í sær sjálvum, sigur Jóannes Eidesgaard.

Løgmaður væntar ikki, at tað verður gjørligt at berja niður hasar 400 milliónirnar, uttan at avleiðingarnar verða ov ógvusligar fyri føroyska samfelagið, men hann er sannførdur um, at tað eigur at lata seg gera at spara í almenna sektorinum og fyrisitingini, so hallið gerst so lítð sum gjørligt.

– Tað verður fokuserað so nógv uppá, at sparingar ikki eru framdar í teimum broytingum, sum júst eru framdar, men tað er tað, vit við skerjingini av aðalráðum hava ruddað slóð fyri, og nú er so klárt at taka næsta stigið, sigur Jóannes Eidesgaard.

Spurdur, um Føroya fólk sostatt skal vænta uppsagnir í fyrisitingini í framtíðini, er løgmaður avgjørdur.

– Skulu vit fáa eina nøkunlunda borðbara fíggjarlóg, kunnu vit ikki bert hyggja at sparitiltøkum aðrastaðni í samfelagnum men mugu eisini finna sparingsmøguleikar hjá okkum sjálvum, og m.a. kann hetta merkja, at færri fólk vera at fremja uppgávurnar, ásannar Jóannes Eidesgaard.

Enn er ov tíðliga at áseta tal av uppsagnum, men løgmaður ivast ikki í, at sparast kann á nógvum økjum, og at Føroya fólk tískil kann vænta sær skerjingar í almennu fyrisitingini næstu fýra árini.

### Politikarar stýra embætisverkinum

Í viðmerking í Sosialinum í gjár sigur fyrrverandi løgmaður Anfinn Kallsberg, at við skerjingunum av aðalráðum er embætisverkið vorðið sterkari, meðan politiska stýringin er viknað. Í viðmerking til hetta heldur Jóannes Eidesgaard, at embætisverkið ongantíð gerst sterkari, enn politiska stýringin loyvir.

– Um vit hava nóg sterkar politikarar, og um teir sjey núverandi landsstýrismenninir vita, hvat teir vilja, fær embætisverkið ikki ov stóra ávirkan, og so verður hetta ikki nakar trupulleiki. Embætisvaldið kann ongantíð fara longri, enn politiski myndugleikin loyvir, og tí er hesin spurningur tengdur at framferðarhátti hvørjum politikara sær, sigur løgmaður um viðmerking Anfinn Kallsbergs í gjár.

Samanumtikið undirstrikar løgmaður, at við skerjingini av aðalráðum og broytingunum í fyrisitingini er fyrsta stigið at spara tikið.

– Lat nú hesi aðalráðini koma í gongd, áðrenn vit finna útav, hvar vit víðari kunnu spara, t.d. við at redusera núverandi embætisverkið, tí hallið á fíggjarlógini er ein veruleiki, vit mugu fyrihalda okkum til og føra okkara politikk út frá, sigur landsins hægsti myndugleiki, Jóannes Eidesgaard at enda.

Uttanríkismálini:

# Ongar broytingar í praksis

**– Hóast øll uttanríkismálini nú eru savnað undir løgmann, er talan als ikki um nakrar skerjingar í rættindunum hjá landsstýrismonnum, og í praksis verða ikki stórvegis broytingar, sigur løgmaður Jóannes Eidesgaard**

UTTANRÍKISMÁL
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Føroya løgmaður boðaði fyri stuttum frá, at nú verða øll uttanríkismál savnað á uttanlandsdeildini í Løgmálaráðnum. Seinnu árini hava uttanríkismál verið spjadd í ymsu aðalráðunum. Í Sosialinum í gjár legði Jóannes Eidesgaard dent á, at hann ikki sjálvur fór at standa fyri t.d. fiskivinnusamráðingum, men er nýggja stigið tikið við endamálinum at geva løgmanni betri innlit í tey mál, hann formliga umsitir.

– Uttanríkismál hava formliga altíð verið undir løgmanni, og hóast løgmenn seinnu árini í størri mun hava lagt út ymisk uttanríkismál til landsstýrismenninar, hoyra uttanríkismál framvegis undir løgmann, og tískil er tað mín ábyrgd at hava innlit í og samskipa hesi mál, sigur Jóannes Eidesgaard.

Løgmaður leggur dent á, at í praksis verða fáar broytingar, har landsstýrismenn framvegis skulu standa fyri samráðingum á sínum økjum, men ynskir hann við savningini av uttanríkismálum at ogna sær betri yvirlit og samskipan á økinum.

- Tað er løgmaður, sum leggur nýggjar avtalur fram, og tað er hann, sum á pappírinum hevur ábyrgdina, og tískil hava vit mett, at savningin av uttanríkismálum hevur verið neyðug, men í praksis hava nýggju landsstýrismenninir eins stóra ábyrgd og áður, og er talan tí ikki um stórvegis broytingar í praksis, slær løgmaður fast.



# Fiskur úr Russlandi kann skapa nógv arbeiðspláss í Suðuroynni

**– Men tað er ein fortreyt, at landið letur okkum endurgjald fyri tollin, sigur stjórin í Føroya Fiskavirking**

ARBEIÐSPLÁSS
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Ætlanin er framvegis at flakavirkið í Vági skal lata uppaftur. Stjórin í Fiskavirking heldur, at ein gongd leið kundi verið at keypt fisk úr Russlandi til virkingar í Vági. Men skal tað lata seg gera, má tað almenna vera við*

– Flakavirkið í Vági verður latið uppaftur.

Tað sigur Meinhard Jacobsen, stjóri í Føroya Fiskavirking.

Nú er liðugt at taka laks á stóra flakavirkinum hjá Fiskaviring í Vági og sostatt er heldur onki arbeiði á virkinum.

Men ætlanin er ikki, at virkið skal standa tómt longi.

Tað er langt síðani, at Vágs Kommuna setti Fiskavirking sum treyt, at arbeiði skal vera á virkinum í Vági.

Megnar Fiskavirking ikki sjálv at hava arbeiði á virkinum, skal tað leigast ella seljast onkrum, sum kann fáa arbeiði aftur á virkiðella má Fiskavirking taka virkið niður og flyta tað, so at grundstykkið verður tókt.

Virkið stendur á grundstykkið, sum er leigað frá kommununi og kommunan hevur hótt við at siga leigumálið upp, verður onki arbeiðið á virkinum.

Hetta er Fiskavirking við uppá, tí leiðslan har hevur boðað frá, at ætlanin er at hava arbeiðið á flakavirkinum í Vági. Fiskavirking hevur avtalað við býráðið, at virkið skal ikki liggja stilt, tí tað hevur ongantíð verið ætlanin, at virkið skal liggja stilt.

Men nú laksavirkið er hildið uppat, og lítið og lítið og onki arbeiði er í Vági, er spurningurin meiri átrokandi enn nakrantíð at fáa arbeiðið aftur á virkinum.

Jógvan Krosslá, borgarstjóri í Vági, sigur, at Býráðið stendur við treytirnar, sum eru settar fiskavirking. Og Meinhard Jacobsen, stjóri í Fiskavirking sigur, at Fiskavirking stendur eisini við sína avtalu við Vágs Býráð um, at arbeiðið skal vera aftur á virkinum.

Hann sigur, at fyrsta stigið er at royna at keypa útgerðina, sum hevur verið brúkt í sambandi við laksaslaktið.

– Suðuroyggin er eitt av fáu økjunum, har smolt er at seta út aftur, so vónandi kemur alingin fyri seg aftur og tá ætla vit at bjóða virkið fram til tað eisini, sigur stjórin í Fiskavirking.

– Men vit kanna eisini, hvat annað virksemið kann vera á virkinum, tí virkið er stórt og tað er ikki lønandi at lata størsta partin av tí standa tómt.

Meinhard Jacobsen sigur, at ymsir møguleikar verða kannaðir.

Men hann vil ikki siga, hvørjir teir møguleikar eru. Hann vil heldur ikki siga nakað um, nær arbeiðið kann væntast aftur á virkinum.

– Men tað er ongin loyna, at tað sera, sera tungt at fáast við fiskivinnu í løtuni. Tað ger ikki støðuna léttari, men vit eru ikki fallin í fátt, og vit ætla okkkum ikki at sita hendur í favn, leggur hann afturat.

### Russarafiskur er ein møguleiki

Meinhard Jacobsen sigur, at ein máti at fingið rættiliga nógv arbeiðspláss í Vági, kundi verið at innflutt frystan fisk úr Russlandi og virka hann í Vági. Men skal tað bera til, er tað ein fortreyt, at tað almenna er við.

– Fyri nøkrum árum síðani lat tað almenna tollendurgjald fyri tann fisk, sum vit innfluttu úr Russlandi og virkaðu í Føroyum.

– Endurgjaldið var 1,10 krónur fyri hvørt kilo av ráfiski.

– Hetta gav rættiliga nógv arbeiði, men tað datt niðurfyri, tá ið endurgjaldið varð tikið av.

Meinhard Jacobsen sigur, at russarafiskur kundi verið ein møguleiki at fingið nógv og støðug arbeiðspláss í Vági.

Hann vísir eisini á, at tað er nógv mikið av frystigoymslu í Vági so umstøðurnar eru til staðar at arbeiða russarafisk.

– Men skal tað lata seg gera, er tollendurgjaldið ein fortreyt, sigur Meinhard Jacobsen.

Og hann sigur, at eitt endurgjald uppá 1,10 krónur fyri kilo, hevði gjørt ógvuliga stóran mun.




